UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Tórshavn, tann 7. mars 2024
J. nr.: 24/00911-6
Viðgjørt: ARØ
Tygara skriv:

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
Galdandi orðingar	**§ 1** Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við § 2 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, verða gjørdar hesar broytingar:
	1. Í § 3, stk. 4, § 8, stk. 4, § 12, stk. 3, § 13, stk. 3, § 14, stk. 2, § 15, stk. 3, § 19, stk. 3 og 4, § 19 a, stk. 7, 1. og 2. pkt., og stk. 8, § 20, stk. 2 og 3, § 23, § 24, stk. 1 og 2, og § 25, stk. 1, 1. pkt., og stk. 2, verður "Landsstýrismaðurin" broytt til: "Landsstýrisfólkið".
§ 8. .... *Stk. 2.* Skyldur og rættindi sbrt. hesi lóg eru knýtt at móttiknum inntøkum, sum eftir skattalógini eru A-inntøkur, og inntøkum av sjálvstøðugari vinnu sbr. § 20. *Stk. 3-4*.....	**2.** § 8, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Skyldur og rættindi sbrt. hesi løgtingslóg eru knýtt at móttiknum inntøkum, sum eftir skattalógini eru A-inntøkur, inntøkum av sjálvstøðugari vinnu sbr. § 20 og lestrarstudningi sbr. § 20 a."

§ 13. Barsilspeningur er 100% av útrokningargrundarlagnum sbrt. § 12, tó soleiðis, at barsilspeningur ikki kann vera meira enn kr. 25.000 um mánaðin umframt eftirlønargjaldið sbrt. § 14 b. *Stk. 2-3.*	**3.** Í § 13, stk. 1 verður "kr. 25.000" broytt til: "30.000 kr.".
	4. Í § 15, stk. 2, 3. pkt., § 21, stk. 1, og § 25, stk. 1, 2. pkt. verður "landsstýrismaðurin" broytt til: "landsstýrisfólkið".
	5. Í § 15 a, stk. 1, 1. pkt., og § 22 verður "landsstýrismanninum" broytt til: "landsstýrisfólkinum".
§ 15 a. .... *Stk. 2.* .... *Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í vinnumálum ásetur nærri umsitingarligar reglur, herundir um freistir fyri at lata inn umsóknir.	**6.** Í § 15 a, stk. 3 verður "Landsstýrismaðurin í vinnumálum" broytt til: "Landsstýrisfólkið".
§ 17. .... *Stk. 2.* Gjaldskyldug smbrt. stk. 1 eru 1. øll, sum fáa A-inntøku, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og 2. øll, sum rinda A-inntøku í Føroyum. *Stk. 3-4.* ….	**7.** Í § 17, stk. 2 verður "smbrt." broytt til: "sbrt.", og í nr. 1 verður "men ikki 67 ár" broytt til: "men ikki hava nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a.".
§ 18. Gjaldið verður kravt av øllum A-inntøkum, sum tey gjaldskyldugu fáa ella rinda, tó undantikið 1) fólka- og fyritíðarpensjón, 2) aðrar skattskyldugar almannaveitingar, tó ikki dagpening eftir dagpeningalógini, og endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3 í forsorgarlógini, 3) tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, uppihaldspeningur sbrt. hjúnabandslógini og barnapeningur sbrt. "lov om børns retsstilling", og	**8.** § 18, nr. 1 verður orðað soleiðis: "1) fólkapensjón, fyritíðarpensjón og framskundað pensjón,".

4) A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini, ella fyri A-inntøku til avmarkaða skattskyldu umborð á skipum, sum eftir § 2, stk. 1, litra j, 2. pkt. í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, við seinni broytingum, verða javnmett við skip, ið eru skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum, um tey vóru føroysk, lúka treytirnar í § 1, stk. 1 í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá. *Stk. 2*. (Strikað).	
§ 18. Gjaldið verður kravt av øllum A-inntøkum, sum tey gjaldskyldugu fáa ella rinda, tó undantikið 1) fólka- og fyritíðarpensjón, 2) aðrar skattskyldugar almannaveitingar, tó ikki dagpening eftir dagpeningalógini, og endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3 í forsorgarlógini, 3) tænastumannapensjónir og aðrar líknandi eftirlønir, uppihaldspeningur sbrt. hjúnabandslógini og barnapeningur sbrt. "lov om børns retsstilling", og 4) A-inntøka til avmarkaða skattskyldu undir FAS-skipanini, ella fyri A-inntøku til avmarkaða skattskyldu umborð á skipum, sum eftir § 2, stk. 1, litra j, 2. pkt. í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, við seinni broytingum, verða javnmett við skip, ið eru skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum, um tey vóru føroysk, lúka treytirnar í § 1, stk. 1 í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá. *Stk. 2*. (Strikað).	**9.** § 18, nr. 2 verður orðað soleiðis: "2) aðrar skattskyldugar almannaveitingar, tó ikki dagpening sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m., endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sbrt. § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og lønaríkoyti til tillagað starv sbrt. § 21 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk,".
Kapittul VII **Sjálvstøðugt vinnurekandi v.m.**	**10.** Heitið á kapitli VII verður orðað soleiðis: "**Sjálvstøðug vinnurekandi, nýútbúgvin o.o.**"
	11. Aftan á § 20 verður í kapitli VII sett:

	"**§ 20 a.** Hjá teimum, sum eru nýútbúgvin og ikki longur hava rætt til stuðul frá Studna, verður studningur, móttikin seinastu 12 mánaðirnar fyri fráveruna, taldur við í útrokningargrundarlagið sbrt. § 12, stk. 1, 1. pkt. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um barsilspening til nýútbúgvin."
§ 21. Til nýtslu í sambandi við útrokning og eftirlit við inngjalds- og útgjaldsupphæddum eftir hesi lóg, kann landsstýrismaðurin útvega sær allar upplýsingar frá TAKS, Landsfólkayvirlitinum og Almannaverkinum. *Stk. 2.*	**12.** Í § 21, stk. 1 verða aftan á 1. pkt. sum nýggj pkt. sett: "Landsstýrisfólkið kann eisini fáa váttan um mettan føðidag og fráboðan um barnsburð beinleiðis frá Heilsuverkinum umframt læknaváttan um, at tað stendst heilsuvandi fyri fostur og/ella kvinnuna sjálva av at vera í starvinum, og váttan beinleiðis frá Familjufyrisitingini um faðirskap og sammóðurskap og kunning um avgerð um, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við ættleiðing."
§ 21. Til nýtslu í sambandi við útrokning og eftirlit við inngjalds- og útgjaldsupphæddum eftir hesi lóg, kann landsstýrismaðurin útvega sær allar upplýsingar frá TAKS, Landsfólkayvirlitinum og Almannaverkinum. *Stk. 2.* Fakfeløg og arbeiðsgevarar hava skyldu at geva landsstýrismanninum tær upplýsingar, hann biður um í sambandi við eftirlitsarbeiði og avgreiðslu av útgjaldi.	**13.** Í § 21 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 2.* Upplýsingarnar, ið landsstýrisfólkið hevur tørv á frá øðrum myndugleikum fyri at kunna útinna uppgávurnar sambært hesi lóg, kunnu fáast til vega við beinleiðis atgongd til elektronisku upplýsingarnar í telduskipanunum hjá viðkomandi myndugleikum." Stk. 2 verður eftir hetta stk. 3.
§ 21. ... *Stk. 2.* Fakfeløg og arbeiðsgevarar hava skyldu at geva landsstýrismanninum tær upplýsingar, hann biður um í sambandi við eftirlitsarbeiði og avgreiðslu av útgjaldi.	**14.** Í § 21, stk. 2, sum verður stk. 3, verður "landsstýrismanninum tær upplýsingar, hann biður um" broytt til: "landsstýrisfólkinum tær upplýsingar, biðið verður um".
	15. Aftan á § 23, men áðrenn yvirskriftina yvir § 24, verður sett: "**§ 23 a.** Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at upplýsingar skulu

	skrásetast og sendast Barsilsskipanini elektroniskt, og kann áseta nærri reglur um elektroniska samskiftið.”